# gur hart út



*Hóast Stjørnan og Polarhav hava skift heimstað og nú eru heimahoyrandi í Klaksvík, bendir einki á, at tey ikki framhaldandi fara at selja sína gulllksaveiði til Tavuna í Leirvík, eins og tey hava gjørt í mong ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

hevur verið við onnur uppisjóvarfiskasløg.

Reiðarar, sum hava landað til Faroe Pelagic, hava latið væl at tænastuni, teir hava fingið har, eins og skipini hava verið avroknað stutt eftir landing.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Vit hava ongar broytingar merkt, síðan eigaraviðurskiftini hjá Tavuni, eins og hjá ísfiskatrolarunum, Polarhavi og Stjørnuni, eru broytt

JÓAN MAGNUS RASMUSSEN

# r sunnukvøldið

Vilmund Jacobsen

Um tað var orsøkin til trupulleikarnar, at skipini fóru fyrsta túrin undir nýggju eigarunum í Klaksvík eitt fríggjakvøld, sigur søgan einki um.

Men óhepnir vóru teir, partrolararnir, Vestmenningur og Fram, tá teir loystu fríggjakvøldið.

Skipini vóru ikki komin langt, tá Fram fekk trupulleikar. Vestmenningur sleipaði makkaran á Havnina, har brekið hjá

Fram varð umvælt, so skipini kundu loysa aftur.

Men enn einaferð stakk sami trupulleiki seg uppaftur, og skipini noyddust aftur at bróta túrin av.

Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at Fram hevur brotið róðurskipanina, og at eykalutir skulu koma úr Noregi.

Men klokkan 21 sunnukvøldið kundu skipini loysa aftur til nýggjan túr.

Vestmenningur og Fram eru á gulllaksaveiði, og hetta er triði túrur hjá skipunum í hesi vertiðini, sum júst er byrjað.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vinnan brúk fyri inntøkum

**MAKRELUR – Eg haldi, at vinnan dugir betri at umsita sínar pengar enn landskassin, og eg haldi eisini, at inntøkurnar fyri stóru makrelkvotuna høvdu farið betri í vinnuna, sum hevur brúk fyri inntøkum – enn í landskassan, sigur Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

Vilmund Jacobsen

Sosialurin hevur í morgun roynt at fáa fatur á løgmanni, Kaj Leo Johannesen, sum nú umsitir fiskivinnumál í landsstýrinum. Løgmaður var á fundi, og soleiðis eydnaðist okkum ikki at fáa fatur í honum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Áhugin fyri makrelinum, sum nú skal bítast millum skipabólkar er stórur, og spurningurin um eitt ella annað slag av tilfeingisgjaldi, er ikki minni stórur, tí hetta verður roknað sum eitt prinsippmál í mun til, hvussu okkara fiskiveiðan annars hevur verið rikin og umsitin gjøgnum mong ár.

Tað var ein stórur meiriluti í uttanlandsnevndini, sum staðiliga mælti táverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, til at selja 60.000 tons av føroysku makrelkvotuni á uppboði. Hetta eru tey tonsini, sum eru útyvir tað, sum annars svarar til 15% av tilmæltu heildarkvotuni av makreli fyri 2011.

Orsøkin til, at Jacob Vestergaard setti føroysku makrelkvotuna í ár til 150.000 tons, tá semja annars ikki fekst millum strandalondini um felagsbýti, er, at hesin kvotupartur svarar til umleið 15% av tí, sum mett verður fer at verða fiskað av makreli í Norðuratlantshavi í ár.

Ísland, Noreg og ES ásettur sær sínar eginkvotur, áðrenn Føroyar ásettu sær sína, og tað var út frá kvotupørtunum hjá hinum londunum, at Jacob Vestergaard gjørdi av, at føroyski parturin í ár verður 150.000 tons.

Tá løgmaður, Kaj Leo Johannesen, gjørdi av at koyra Fólkaflokkin úr samgonguni, tí flokkurin ikki vildi taka undir við fíggjarkarminum, fall arbeiði við eini kunngerð um makrelbýti hjá Jacobi Vestergaard, fyrrverandi fiskimálaráðharra, burtur.

Nú situr parturin, sum er eftir av samgonguni saman við pørtum av andstøðuni – og tá serliga Tjóðveldi – og roynir at snikka eina nýggja kunngerð saman, sum skal sendast Fiskivinnuráðnum til ummælis.

Hvat úrslitið verður av hesum, veit eingin í løtuni, og tíverri eydnaðist ikki Sosialinum at fáa orð á løgmann í morgun, tá vit ætlaðu at spyrja hann um, hvussu gongur við hesum arbeiði.

Sosialurin hevur tó skilt, at løgmaður er ikki sinnaður at selja ein part av makrelkvotuni á uppboði, sum talan annars hevur verið um, men hann hevur hinvegin róð uppundir at áleggja eitt kilogjald á veiðina eftir makreli.

Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður, sigur, at skal eitt kilogjald leggjast á makrel, verður neyðugt at fremja broytingar í skattalógini, áðrenn slíkt kann gerast.

- Sjálvur harmist eg um, at ætlanin nú er at leggja gjald á makrel, tí hetta kemur at gera kappingarførið hjá føroyskari fiskivinnu verri mótvegis okkara grannalondum.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin heldur, at vinnan dugir betri at umsita sínar pengar enn landskassin.

- Eg haldi eisini, at inntøkurnar fyri stóru makrelkvotuna høvdu farið betri í vinnuna, sum hevur brúk fyri inntøkum – enn í landskassan, sigur Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Spurningurin er, um løgmaður, Kaj Leo Johannesen, sum nú eisini er virkandi fiskimálaráðharri, fer at fáa undirtøku fyri einum ella øðrum formi fyri tilfeingisgjaldi á makrel*